

## Móttøka í Hornabø

Snotiliga deildin hjá Føroya Sparikassa í Hornabø, J. C. Svabosgøtu 58, er nú liðug eftir umfatandi umbygging. Í hesum sambandi verður boðað frá, at øll eru hjartaliga vælkomin til móttøku.

Støkkið inn á gólvið í Hornabø mikudagin 24. apríl millum klokkan 15.00 og 17.00.

Deildin letur upp aftur komandi mánamorgun 29. apríl klokkan 09.30.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# Politiskt kjak á Café Natúr

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*

Í kvøld, mikukvøldið kl. 20.00 verður seinasti av teimum fýra kjakfundunum, Sosialistiskt Ungmannafelag og Unga Tjóðveldið í felag skipa fyri. Evnið henda síðsta kjakfundin verður »Umhvørvið«.

Umboð fyri allar politisku flokkarnar vera við, og eisini verður høvi hjá áhoyrarum at seta spurningar. Øll eru vælkomin, heilsa tey frá Sosialistiskum Ungmannafelag og Unga Tjóðveldinum.

# Vitjan í útisavninum í Hoyvík

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Fornminnissavn*

Týsdagin kl. 9 til út á seinnapartin fær fornminnissavnið vitjan av einum fronskum ferðalagi, frá Hermes, í útisavninum Heimi á Garði í Hoyvík. Tað er Randi Meitil, ferðaleiðari, sum hevur rætt fyrispurning til fornminnissavnið. Fólk frá Heimavirkisfelagnum gera savnið livandi. Onkur er í roykstovuni í Hoyvíksgarði, onkur í smiðjuni og onkur í Hoyggjhúsinum.

Tey vitjandi fáa eina rundvísing í útisavninum og vitja bátasmíðið á Fjósloftinum. Sýnt verður fram, hvussu snøristól verða nýtt, næmingar úr Náttúruskúlanum í Roskilde hjálpa til, og harafturat verður pílaflætting á skránni.

Hetta tiltakið er ikki opið fyri almenninginum.

# Gerpla umsett til Garpatátt

**- Umsetararnir greiða frá í Norðurlandahúsinum**

Eitt høvuðsverkið hjá íslendska rithøvundinum Halldóri Laxness, »Gerpla«, kemur skjótt út á føroyskum. Martin Næs og Tóra Tóroddsdóttir hava umsett »Gerplu«, og tey kalla bókina »Garpatátt« á føroyskum.

Mikukvøldið 24.apríl kl.19.30 fara tey bæði at greiða frá um verkið og um umsetingina, sum tey hava arbeitt við í nøkur ár, á almennum fundi í Norðurlandahúsinum. Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri fundinum.

23.apríl eru liðin 100 ár, síðani Laxness varð føddur. Hann skrivaði »Gerplu« í 1952, og trý ár seinni fekk hann Nobelvirðislønina fyri bókina, sum er skrivað sum ein fornsøga. Føroyskt er 12.málið, sum »Gerpla« er umsett til.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu,
ið sýndu okkum samkenslu tá kæri bróður okkara

**Egon Thomsen,**
Froðba

so brádliga andaðist.

Tøkk til Jónsvein Bech prest, sangarar, berarar
og tykkum mongu, sum fylgdu.

Tøkk fyri kransar, blómur og uppringingar.
Ein serlig tøkk til Tvøroyrar býráð

*Fyri tey avvarðandi*

**Bjarki, Bjørg, Sverri og Eyðna**

# Flaggdagshald í Havn

TÍÐINDASKRIV
*Havnar Hornorkestur*

Hósdagin 25. apríl 2002 er flaggdagur, og eins og undanfarin ár, er tað Havnar Hornorkestur, sum skipar fyri flaggdagshaldinum í Havn.

Sum vant, verður gingið skrúðgongu frá nýggja Kommunuskúlagarði við Havnar Hornorkestri og skótum oman á Vaglið, har Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, í ár heldur flaggdagsrøðuna.

Eins og undanfarin ár, verða bæði vanliga lagið til flaggsangin og lagið, sum Gunnar Mikkelsen gjørdi til henda, at hoyra. Skrúðgongan, við skótum og hornorkestri, fer úr kommunuskúla-garðinum klokkan 1500 og luttakararnir skulu verða í skúlagarðinum í seinasta lagi klokkan 1445.

# Flaggdagshald í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV
*Fuglafjarðar Hornorkestur*

Sum vant skipar Fuglafjarðar Hornorkestur fyri flaggdagshaldi á flaggdegnum.

Haldið verður niðri við Bókasavnið kl. 17, og røðari í ár verður Magni Joensen, lærari.

Skótarnir verða eisini við til at seta dám á – og Hornorkestrið fer at spæla okkurt lag, sum tey hava vant í samband við hornorkesturstevnuna, ið GHM skipar fyri í Havn um vikuskiftið.



# Deildin í Hornabø í nýggjan ham

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Sparikassi*



*Frá og við mánadegnum 29. apríl fer øll avgreiðsla í Hornabø fram í nýggjum hølum*

Í dag kl. 15-17 verður móttøka á umbygdu deildini hjá Føroya Sparikassa í Hornabø. Hetta er eisini síðsti avgreiðsludagur í teimum leigaðu hølunum í J. C. Svabosgøtu 54, sum deildin hevur húsast í síðani umbyggingin byrjaði í mai 2001.

Frá og við mánadegnum 29. apríl fer øll avgreiðsla í Hornabø fram í nýggju hølunum.

Í sambandi við umbyggingina varð gjørt av at deildin í framtíðini ikki bert skal virka sum avgreiðsludeild, men eisini skal veita privatkundum lán, íløguráðgeving, eftirlønaráðgeving o.a., soleiðis at kundarnir kunnu fáa øll síni ørindi avgreidd á deildini.

Ynskini til peningastovnar broytast, og tí vil Sparikassin tillaga seg tørvin hjá tí einstaka kundanum og gera umstøðurnar fyri ráðgeving betri.

Og talan er um stórar broytingar. Frá bert at hava havt niðastu hædd við einum lítlum tilbygningi til taks, so er meira bygt aftrat, samstundis sum, at alt tað upprunaliga húsið er tikið við í arbeiðsøkið. Á niðastu hædd er stórt og ljóst avgreiðsluhøli, ið er 119 m2 til støddar, fundarhøli og sjálvtøka. Fasadan móti vegnum er ein stórur og vakur glasveggur. Á miðhæddini eru tvey fundarhøli og kundatoilett. Á ovastu hædd er starvsfólkakøkur, edv-rúm og toilett.

Ein onnur broyting er at sjálvtøkan er flutt inn í gongina. Úttøkukortið virkar sum lykil til hurðina, so tað ber til at taka út pening allar dagar frá kl. 06 til 24.

Tað er akitektavirkið hjá Árna Winther, sum hevur teknað nýggju hølini, sum eru tilsamans 203 m2, og innrættingin er gjørd í samstarvi við Stephanssons Hús.

Á deildini fara átta fólk at starvast. Mathea Hilduberg er fyribils sett sum deildarleiðari til 1. august 2002, tá Sæunn L. Petersen tekur við. Sæunn er 30 ár og hevur seinastu árini verið í Danmark í lestrarørindum, har hon hevur lokið HD prógv. Hon hevur lært í Sparikassanum, og hevur hollar royndir sum kundaráðgevi, bæði fyri privat- og vinnulívskundar.



Veljið samstarv og úrslit!

Sjálvstýris flokkurin

**Eitt gott val!**



Eilif Brimheim



John Eysturoy



Hans J. Hermansen



Noomi S. Júliusson



Ása Olsen



Roar Heini Olsen



Ronald Poulsen



Johan M. Stenberg



Thordur Thorsteinsson

**Sjálvstýrisflokkurin**

*Valenini í Suðurstreymoyar valdømi*